Eldraráðið í Tórshavnar kommunu
Tórsgøta 21, 100 Tórshavn
eldrarad@torshavn.fo

# Eldraráðið 2021 – 2024

| | |
|---|---|
| Fundur: | Nr. 3 |
| Tíð: | 02-03-23 kl. 12.00 – 13.30 |
| Stað: | Tilhaldið í Tórsgøtu |

**Møtt:** Petur Rouch, skrivari, Marin Rasmussen, limur og Robert Vilhelmsen, limur. Katrin Holm og Julianna Klett høvdu forfall og kundu ikki møta.

**Fundarskrá:**

1. Innkallan av eykalimum
2. Skipa okkum av nýggjum
3. Ymiskt

AD 1 Innkallan av eykalimum

Aftur hesu ferð vóru bara trý, sum møttu á fundinum.

Eldraráðið hevur sett fram ynski um broyting í viðtøkunum um at minka talið av valdum til fimm fastar limir og tveir eykalimir, men spuringurin er, um hetta er skilagott. Um hetta hevði verið galdandi, høvdu vit nú nátt markið, tí Robert er nummar tvey eykalimur. At bara trý møta er ikki nøktandi, so vit mugu á næsta fundi taka støðu til, um vit skulu kalla inn nummar 8 og nummar 9, tá tørvur er á tí.

AD 2 Skipa okkum av nýggjum

Síðani Bjørghild Djurhuus segði seg úr Eldraráðnum hava vit ikki nakað næstforfólk. Tí eiga vit á komandi fundi at skipa okkum av nýggjum.

AD 3 Ymiskt

Robert hevur á Facebook innlegg um tey skattligu viðurskiftini hjá pensjónistum, nú trot er a arbeiðismegi. Stílað til nývaldu landsstýrisfólkini. Innleggið er soljóðandi:

*"Vallyftini til pensjónistarnar gloymd í fíggjarlógaruppskotinum – ella er tað tilvitað?*

*Nýggja Landsstýrið minkar ríkisstuðulin úr Danmark við 25 milliónum hvørt ár næstu 4 árini og hetta skulu m.a. fólkapensjónistarnir svíða fyri, tí ongin fígging er til at taka burtur mótrokningina í pensjónsviðbótini. Hinvegin, so hevur danska stjórnin samtykt at taka burtur alla mótrokningina hjá donsku pensjónistunum í einum, við afturvirkandi gildið frá 1.1.23.*

**Eldraráðið í Tórshavnar kommunu**
**Tórsgøta 21, 100 Tórshavn**
**eldrarad@torshavn.fo**

*Arbeiðsmarknaðurin rópar eftir fleiri hondum og ikki minst innan heilsurøktina og barnaansingina, og tað hevur danska stjórnin tikið til eftirtektar og beint burtur forðingarnar hjá fólkapensjónistunum, til at rætta eina hond – ongin mótrokning í pensjónini!*

*Hvat hugsar Landsstýrið? At hækka inntøkumarkið fyri mótrokning frá kr. 45.000 til 60.000 merkir umleið kr. 250 pr. mánað í mótrokningini, og tað er at halda pensjónistarnar fyri spott! Eisini er sera viðkomandi at nevna brennistuðulin kr. 328, sum fellur burtur um inntøkan, samanlagt fyri hjúnini, fer upp um kr. 80.000, tvs. kr. 40.000 í eyka inntøku hvør.*

*Ein giftur pensjónistur fær netto, aftaná skatt, umleið kr. 11.556 um mánaðin, alt eftir hvør kommunan er, og um ongin eyka inntøka er. Av hesi pensjónini verður goldið umleið kr. 1.400 í skatti, tí at viðbótin og Samhaldsfasti eru fult skattskyldugar. Við hesum fær Landskassin tætt við helvtina av viðbótin afturgoldið yvir skattin og hetta uttan møguliga eykainntøku. Afturat hesum er eisini viðkomandi at nevna dupultskattingina av Samhaldsfasta útgjaldinum – øll gjalda fullan skatt av inngjaldinum til Samhaldsfasta til tey fylla 67 og síðan verður útgjaldið til pensjónistarnar fult skattað – her má eisini vend koma í!*

*Pensjónistarnir vera skattaðir og mótroknaðir so tað bløðir, um teir forvinna sær kr. 45.000 ella 60.000 afturat pensjónini og enn verri um inntøkan gerst hægri – her má av álvara vend koma í soleiðis at pensjónistarnir, eftir førimuni, kunnu taka enn størri tak og eru vælkomnir á arbeiðsmarknaðinum. Landskassin fær í stóran mun fíggingina umvegis skattin frá pensjónistunum jú størri eyka inntøkan er.*

*Geri sum danska stjórnin – taki burtur forðingarnar beinanvegin, tvs. ongin mótrokning í pensjónini og vís í verki, at pensjónistarnir eisini eru vælkomnir á okkara arbeiðsmarknaði, sum rópar neyðarróp eftir fleiri hondum."*

Innleggið er frá Robert persónliga, men á fundinum var full undirtøka fyri hesum. Vit eiga saman við øðrum eldraráðum og Føroya pensjónistafelag at skipa fyri fundi við avvarðandi landstýrisfólk um hesi viðurskifti. Um tað er politiskt torført at broyta inntøkumørkini kundi ein onnur loysn verið, at gjørt Samhaldsfasta skattafrían. Vit hava øll rinda skatt av upphæddini, tá vit guldu inn í Samhaldsfasta, so hví skulu vit enn einaferð skattast av upphæddini, nú vit faa hana útgoldna.

Eitt annað mál, vit eiga at arbeiða við, eru bústaðarviðurskiftini hjá teimum eldru. Í tey seks árini undirritaði hevur sitið í Eldraráðnum hevur dúgliga verið tosað um eldraíbúðir, men enn er onki ítøkiligt komið burtur úr tosinum. Onki, ikki ein einasta íbúðarbygging ætlað teimum eldru er nakni veruleikin.

Næsti fundur í Eldraráðnum verður fríggjadagin 14. apríl 2023, klokkan 13:00 í Tilhaldinum.

Tórshavn 2. mars 2023.

Petur Rouch,
skrivari